# SPENNANDI STARV Á TEKNISKU DEILD HJÁ FUGLAFJARÐAR KOMMUNU

**Ert tú verkfrøðingur, byggifrøðingur ella hevur aðra hóskandi útbúgving, so er eitt spennandi starv á teknisku deild í Fuglafjarðar kommunu leyst at søkja**



Talan er um eitt sjálvstøðugt og avbjóðandi starv, har tann setti hevur møguleika at menna tekniska økið í kommununi og seta dám á gerandisdagin.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir í verkætlanum, royndir frá kommunalari umsiting, kunnleika til 360 journalskipanina, kunnleika til ArcGIS kortskipaninia og dugir at brúka AutoCAD.

**ARBEIÐSØKIÐ**

- Byggimálsviðgerðir
- Verkætlanir
- Viðgerð og avgreiðsla av málum á tekniska- og vinnuøkinum
- Umsita og avgreiða matrikulmál
- Umsjón og tilrættalegging av viðlíkahaldi av kommunalum bygningum/ognum
- Samskipari av húsavarðatoyminum
- Samskifta við borgarar og myndugleikar
- Taka sær av ávísum skrásetingum
- Umsita grundstykkjalista kommununar
- Umframt aðrar uppgávur á teknisku deild, sum eisini verða álagdar av tekniska leiðaranum av deildini.

**FØRLEIKAR**

- Útbúgving sum verkfrøðingur, byggifrøðingur ella líknandi.
- Kunnleika til byggisamtyktir og býarskipanir
- Kunna tekna í AutoCad
- Góðar málførleikar í skrift og talu.
- Opin og fyrikomandi og góð evni at samstarva við m.a. borgarar, vinnulív, almennar myndugleikar, starvsfólk og kommunustýrislimir.

**VIT KUNNU BJÓÐA**

- Eitt starv við fakligum avbjóðingum á ymsum økjum
- Góðar møguleikar fyri menning
- Ein fjølbroyttan og spennandi gerandisdag.

**SETANARVIÐURSKIFTI**

Talan er um fulltíðarstarv, ið verður sett 1. desember 2018 ella eftir nærri avtalu. Tann setti vísir beinleiðis til tekniska leiðaran.

Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum AKF og Fíggjarmálaráðið.

www.fuglafjordur.fo

**UMSÓKNIR**

Umsóknir saman við prógvum og upplýsingum um lívsroyndir skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi mikudagin 14. november 2018 kl. 16.00 á adressuni:
Fuglafjarðar kommuna
Ennivegur 38
530 Fuglafjørður
ella á teldupostadressu:
info@fuglafjordur.fo

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Pætur Joensen, leiðara á teknisku deild, á telefon 238005, teldupostur: patur@fuglafjordur.fo, ella Jákup Frants Larsen, kommunustjóra, á telefon 238002, teldupostur: jakupl@fuglafjordur.fo

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

KREA